VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag :
Um morgunin lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men sum frálíður veksur hann vindin upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Um kvøldið minni vindur og bert okkurt ælið. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís vátakavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men sunnudagin minni vindur og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 5 stig.

Litríkur gestur

Seinastu tíðina hevur ein sonevndur seglont – ella mandarina – kallfuglur verið at sæð i Viðarlundini í Havn

GESTUR
Jákup Mørk

Vakur er hann á at líta. Litríki fuglurin, sum seinastu tíðina hevur búleikast í Viðarlundini.

Nú veðrið hevur víst seg frá síni góðu síðu seinastu dagarnar, hevur nógv fólk eisini verið framvið dunnuhylinum, og ikki so fá munnu hava undrast á, hvat slag av fugli talan er um.

Jens Kjeld Jensen, fuglafrøðingur, sigur, at talan er um ein sonevndan seglont. Á donskum er heitið mandarina, og stavar hetta frá uppunanum hjá fuglinum. Hesin er nevnliga kinversk, men varð hann í síni tíð innfluttur til Onglands. Hetta tí menn hildu hann vera so vakran á at líta.

- Hetta er kanska eisini vakrasta dunnan, sum finst, heldur Jens Kjeld Jensen, og hann sigur, at heilt óvanligur er hann ikki í Føroyum.

- So líðandi er talan blivin um ein fugl, sum er vorðin alt meira vanligur í Onglandi, og seinnu árini hevur hann eisini ferðast nakað runt í Europa. Í Føroyum hevur hann verið at sæð soleiðis av og á seinastu tíggju árini, staðfestir hann.

Tað er serliga kallfuglurin, sum fólk leggja til merkis, litríkur sum hann er. Kvennfuglurin er meira álíkur vanligari dunnu, og er tí heilt so eyðsýndur.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-6
Nuuk	1
Qaqortoq	3
Ammassalik	-2
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	3
Seyðisfjørður	6
Tórshavn	7
Lerwick	10
Aberdeen	13
London	18
Tromsø	6
Bergen	9
Oslo	--
Stokkhólm	10
Keypmannah.	13
Helsinki	8
Moskva	7
Berlin	27
Warzawa	17
Kiev	11
Bukarest	18
Paris	22
Madrid	23
Róm	22
Malorca	24
Athen	22
Malta	20
Tunis	27
Beijing	25
New Dehli	31
Bangkok	36
Jakarta	30
Sydney	22
New York	15
Miami	28
Los Angeles	19
Meksikobýur	25
Panama	25
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	23

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 990 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing . Eitt annað lágtrýst, 1004 hPa. yvir Írlandi fer eystureftir.

Í dag:
Lágtrýstið yvir Íslandi fer í landnyrðing eystan og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.

I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 02/5 kl. 06⁰⁰– 03/5. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,5°
Minsti hiti máldur í mai: -9,9° - Mesti hiti máldur í mai: 18,3°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 02/5 kl. 06⁰⁰– 03/5 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 3,0 mm

Sosialurin

VESTFALLSKYRRINDI

29. apr.	Mánin næstur jørðini
1. mai	Seinna kvarter
8. mai	Tendring
14. mai	Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2005

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
4. mai	04.25	16.48	03.25	15.48	03.40	16.03	06.25	18.48	07.25	19.48	02.40	15.03	01.40	14.03	04.40	17.03	05.40	18.03	04.10	16.33	05.25	17.48
5. mai	05.10	17.32	04.10	16.32	04.25	16.47	07.10	19.32	08.10	20.32	03.25	15.47	02.25	14.47	05.25	17.47	06.25	18.47	04.55	17.17	06.10	18.32
6. mai	05.54	18.17	04.54	17.17	05.09	17.32	07.54	20.17	08.54	21.17	04.09	16.32	03.09	15.32	06.09	18.32	07.09	19.32	05.39	18.02	06.54	19.17
7. mai	06.38	19.00	05.38	18.00	05.53	18.15	08.38	21.00	09.38	22.00	04.53	17.15	03.53	16.15	06.53	19.15	07.53	20.15	06.23	18.45	07.38	20.00
8. mai	07.23	19.46	06.23	18.46	06.38	19.01	09.23	21.46	10.23	22.46	05.38	18.01	04.38	17.01	07.38	20.01	08.38	21.01	07.08	19.31	08.23	20.46

5 707265 100036 >